Treingja húsini til dagføringar?




# ORKUUMVÆLING

fá munandi part av íløguni afturgoldna av orkusparingini

***VIÐLÍKAHALD, so sum at skifta klædning, tak, vindeygu o.a. eru neyðugar útreiðslur sum árini ganga, um húsini ikki skulu falla í órøkt.***

***Um húsini verða orkuumvæld fyrst, ella samstundis sum vanliga viðlíkahaldið verður gjørt, tá fært tú eisini ein betri bústað við munandi betri inniklima.***

***Útreiðslan blívur tá ofta til eina íløgu ístaðin.***

*Byggitrygd Spf.*

Liðagøta 2
Postsmoga 2198
110 Tórshavn

tel. +298 239090
info@byggitrygd.fo
www.byggitrygd.fo

## Hví orkuumvæla?

**Endamál**

Trekkur, fótakuldi, fuktur, blámusoppur og høg orkunýtsla, eru øll tekin um at húsini treingja til eina orkuumvæling.

Ein orkuumvæling hevur sum endamál, at minka um orkutørvin, samstundis sum bygningsfysikkurin verður betraður.

Ístaðin fyri bara at umvæla tað sjónliga í samband við vanligt viðlíkahald, fara vit djúpri inn í konstruktióninar og kanna um bygningsfysikkurin er sunnur.
Symptomini omanfyri eru øll tekin um, at ábøtur eru neyðugar.

Vanligt viðlíkahald er ein útreiðsla, meðan ein orkuumvæling eisini kann vera ein inntøka. Ofta er so stór orkusparing, at øll íløgan av orkuumvælingini, umframt partur av vanliga viðlíkahaldinum, verður afturgoldin av orkusparingini.

**Komfort og trivnaður**

Øll ið kenna til køld og ótøtt hús vita, hvussu ónøktand inniklimaðið er í slíkum húsum.

Um farið verður undir vanligt viðlíkahald, so sum at skifta klædning etc., uttan at hugsa um eisini at orkuumvæla, so merkist nærum ongin ágóði av íløguni innandurða, meðan tey sum eisini orkuumvæla fáa ein munandi betri komfort og trivnað inni.

## Vit kanna:

**Endurbjálving**

Vit kanna, um bjálvingarstøðið er nøktandi, og um bjálvingin liggur sum hon er ætlað.

Hugt verður m.a. eftir:

- ✓ Lofti og skráveggum
- ✓ Væðingsveggum og gólvi
- ✓ Skilagólvum og lendisgólvi
- ✓ Útveggum
- ✓ Krúpikjallara og fundamentum

**Tetting**

Vit kanna, um trekkur sleppur inn og er við til at niðurkøla húsini.

Hugt verður m.a. eftir:

- ✓ Vindeygum og úthurðum
- ✓ Samankomingar í konstruktiónum
- ✓ Føringsvegir til rør o.a.

**Hitastýringar**

Vit kanna um stýringarnar eru nøktandi og um tær virka sum ætlað.

Hugt verður m.a. eftir:

- ✓ Termostatum
- ✓ Gólvhitastýringum

**El nýtsla**

Vit kanna, um støðið á útbúnaði ið nýtir streym er nøktandi og meta um lønsemi við at skifta út til nýggjari tøkni.

Hugt verður m.a. eftir:

- ✓ Ljósperum
- ✓ Hvítvørum
- ✓ Pumpum

## Hvat kostar orkuumvæling?

Kostnaðurin er ógvuliga ymiskur, alt eftir hvør tørvurin á viðlíkahaldi er, men typist kosta eini miðalhús, ið ikki krevja útskifting av bygningslutum, bert uml. 25.000 - 100.000 at dagføra, alt eftir hvat tørvur er á.

Felags fyri projektini er, at orkusparingin aleina ofta er nóg stór, til afturgjalda íløguna.

## Dømi:

Íløga: 100.000, fíggjað við orkuláni yvir 20 ár
Afturgjalding av láni: kr. 5.475,- árliga netto.

Orkusparing í litrum av olju: 950 litrar árliga
Orkusparing í krónum: 6.650,- árliga

Avlop pr. mðr. fyrstu 20 árini: kr. 98,-
Avlop íalt eftir 20 ár: kr. 23.520,-

Sparing pr. mðr. aftaná 20 ár: kr. 456,-

*(oljuprísur: kr. 7,00 - Árl. renta: 2,5%)*

BYGGITRYGD